# Blokkerandi blokkmytan

HØGNI
HOYDAL



**Heldur enn at ernast av tí, ið vit sjálvi hava megnað og kunnu skapa, verður ein følsk mynd skapt av einum blokkstuðli, sum verður nýtt sum amboð at flýggja undan ábyrgd og framtíðarvisjónum**

Lesarabræv eftir lesarabræv. Røða eftir røða á tingi. Viðmerking eftir viðmerking á netsíðum og millum manna. Og eisini oddagreinar í størstu bløðunum, hava síðani niðurgongdina í búskapinum í 2009, miðvíst roynt at givið blokkstuðulsniðurskurðinum í 2001 ábyrgdina av okkara fíggjar- og búskaparstøðu í dag.

Hetta er ikki bert ein sera følsk mynd av veruleikanum. Hendan blokkmytan er samstundis tann knakin, ið ábyrgdin hjá teimum flokkum, sum hava sitið við valdið í 6 ár, verður hongd á, tá teir fara úr henni hvønn dag. Hon er hartil oyðileggjandi og niðurgerandi mótvegis øllum fólkinum og vinnuni í hesum landi, sum skapa tey veruligu virðini – og sum hava megnað ótrúlig tøk, síðani landið fór á heysin við fullum blokkstuðli í nítiárunum. Og hendan blokkerandi blokkmytan skapar undirbrotligheit og undanstøkking mótvegis teimum broytingum og visjónum, ið politiska skipanin eigur at taka á seg.

**Vit hava havt ov mikið av peningi**

Hvussu følsk blokkmytan er, sæst bert við at hyggja at teimum veruligu búskapartølunum:

- Síðani 1998, tá blokkstuðulin fyrst varð settur til viks og síðani skorin í 2001, hava vit nærum tvífaldað bruttotjóðarúrtøkuna. Úr 7 milliardum upp í 13 milliardir. Tað merkir, at blokkstuðulin í dag bert er uml. 6% av øllum, tí ið vit sjálvi skapa. Og hetta brúka leiðandi politikarar alla orkuna at taka fram, heldur enn at tosa um tey 94%, ið fólkið og vinnan í landinum skapar.
- Inntøkur landskassans eru eisini vaksnar støðugt. Síðani blokkurin varð skorin, eru inntøkur landskassans vaksnar við einari milliard – hóast skattalættar vórðu givnir fyri 400 mió. undir fyrra ABC-landsstýrinum.
- Undir fullveldislandsstýrinum varð skuldin niðurgoldin og milliardir spardar upp. Tað gjørdi, at hóast øll alivinnan og rækjuflotin fór á heysin í 2003, megnaðu vit at standa ímóti uttan kreppu og panikkloysnir. Tað hava vit ongantíð megnað fyrr, tá so stór afturstig eru komin. Í nítiárunum fóru vit á heysin við fullum blokkstuðli.
- Og sjálvt nú, er grundarlagið fyri, at vit yvirhøvur hava møguleika til atgerðir og bata, at fullveldispolitikkurin rindaði skuldina niður og legði pening til viks.

Veruleikin er, at vit ongantíð hava vit havt so nógvan og vaksandi pening, síðani blokkstuðulin varð tikin úr renslinum. Vit áttu at verið ómetaliga errin av tí, sum føroyska samfelagið megnaði frá miðjum 90-unum til 2004.

**Ov nógvur peningur skapt kreppuna**

Men síðani er peningurin lorkaður burtur. Tað, sum hevur skapt kreppuna, er ikki ov lítið av peningi at nýta, men ov nógvur peningur, ið verður oyðslaður burtur og ikki skapar verulig virðir. Og soleiðis hevur tað í veruleikanum altíð verið.

Sannleikin er, at ABC-flokkarnir komu til eitt búgvið borð í 2004, har skuldin var niðurgoldin og 2,3 milliardir spardar upp. Avtalur vóru gjørdar við kommunur um búskapin, 10-ára íløguætlan løgd, skil á fíggjardisiplinini – og onki ár undir fullveldislandsstýrinum hevði givið undirskot.

Hetta varð alt slept. Avtalur við kommunur uppsagdar og langtíðarætlanir sleptar. Kalkulerað varð við undirskoti beinanvegin. Skattalættar givnir, ið hava kostað 400 mió. um árið. Óloglig meirnýtsla hava kostað aðrar 340 mió um árið. Skúlar fluttir og verkætlanir støðgaðar, ið hava tvífaldað kostnað. Bara hetta tilsamans svarar á leið til undirskotið á fíggjarlógini í dag. Harumframt hava sitandi flokkar brotið løgtingssamtyktina um, at peningurin fyri sølu av Føroya Banka skuldi setast í Búskapargrunn. Ístaðin eru hesar 1,6 milliardirnar eisini brúktar.

Úrslitið var ovurnýtsla, har kostnaðarstøðið og kappingarførið ruku av leið. Útlánini hjá bankunum hækkaðu úr 10 milliardum í 2004 uppí 18 milliardir í 2008. Hartil varð arbeiðsmarknaðurin afturlatin fyri útlendskari arbeiðsmegi. Fólk kunnu so bara ímynda sær, hvat var hent, um blokkstuðulin ikki var skorin og hesir pengar høvdu verið sprændir út afturat. Blokkstuðulin hevði í dag verið 1,4 milliard, var hann ikki skorin og fastfrystur.

**Hvat kostar heimastýri og ábyrgdarloysi?**

Tí eru tær avbjóðingar, ið vit hava í løtuni við einum halli uppá 800 mió., júst tær somu, sum tá tað ræður um at gera okkum leys av temum seinastu 600 milliónunum í blokkstuðli. Við einum ábyrgdarfullum búskaparpolitikki, fiskivinnureformi, vinnupolitikki, reformum í almennum skipanum og íløgum í útbúgving og gransking, fara vit sjálvsagt eisini at megna tað. Og taka vit eisini á okkum ræði á okkara atgongd til umheimin og til altjóða samstarv, eru størstu inntøkumøguleikarnir har at finna.

Vit eiga at venda følsku myndini um blokkin á høvdið og spyrja:

- Hvat hevur heimastýrið kostað Føroyum? (Sambært Caragata-álitinum, kostaðu bara 80'ini 13 milliardir út gjøgnum vindeygað).
- Hvat hevur ábyrgdarleysur fíggjar- og búskaparpolitikkur og vantandi politisk mál og planlegging kostað Føroyum?
- Hvat hevur tað kostað okkum, at vit ikki hava ræðið á okkara egnu viðurskiftum við umheimin og kunnu gera egnar avtalur við onnur lond?
- Og hvat hevur tað kostað okkum, at meira enn helvtin av øllum politiskum orðaskifti hjá valdum politikarum og teirra stuðlum í bløðunum, snýr seg um at tekna eina falska mynd av, hvat vit ikki megna og hvat vit ikki kunnu?

# Tey forfjónaðu

BERGTÓRA
HØGNADÓTTIR
JOENSEN



Hitti aftur fleiri teirra um jólini. Glaðar, fevnandi søgdu tær mær um lív sítt uttanlands. Góðar útbúgvingar, góð størv, góðan gerandisdag. Børnini trivust og tær við.....Ja, eg tosi sjálvsagt um støku uppihaldarararnar, sum hava valt at seta búgv aðrastaðni enn her, tí tær ikki fingu endarnar at røkka saman her.

Fá hagtøl eru sum vísa, hvussu føroyskar famljur liva. Men Jólahjálpin sum veitti familjum, sum vóru illa fyri fíggjarligan stuðul til jólar segði, at tað serliga vóru støku uppihaldararnir sum vóru illa fyri fíggjarliga.

**Fleiri verða stakir uppihaldarar**

Tá vit hava tosað um stakar uppihaldarar á tingi, tykjast nakrir at halda, at um vit geva teimum ov góð kor í Føroyum eggja vit familjum til at fara hvør til sítt!!! Kenni meg púra sannførda um, at tað ikki er eitt lutvíst frípláss ella 500 kr til hvørt barnið, sum fær eitt par at fara hvør til sítt.

**Virkin familjupolitikkur**

Vit kunnu gera nógv fyri at bøta um støðuna, hjá støkum uppihaldarum og familjum sum annars eru í fíggjarligari trongstøðu. Nakrar ábøtur eru lutfalsliga lættar at gera:

- Broyta skattalógina við at taka burtur, at eyka barnapengar verða skrásettir sum inntøka hjá barninum – við verandi skipan eru børnini hjá støku uppihaldarunum verri fyri fíggjarliga enn hini. Tí hon ger, at hesi børn skulu gjalda skatt fyrr enn hini. Má gera vart við, at tað sama ger seg galdandi fyri tey børn sum eru móður -ella faðirleys og í tí sambandi fáa pensjónsútgjald.
- Betri bústaðarmøguleikar – lestrar -og lutaíbúðir
- Hækka hámarkið fyri lutvísum fríplássi – vøggustova, barnagarður og frítíðarskúli.

**Hava ikki ráð at missa tykkum**

Dýrar broytingar at fremja? Dýrari er at missa hesar familjurnar fyri altíð. Tá tey finna sær maka uttanlands ella børnini eru vorðin hálvvaksin, koma tær heilt vist ikki heimaftur. Sum er, eru longu 2000 færri kvinnur enn menn her – okkum tørvar tykkum og børn tykkara. Vend má koma í.

# Soðið er blivið beista tunt

HENRIK
OLD



Tað kann vera sera áhugavert at lesa ummælið av einum sjálvum, serliga tá ummælari ætlar at finna tað mest negativa um ein, og onnur uppfata royndina sum nærmast positiva.

Havi ringt við at skilja, hvat persónligt syndaregistar hevur við formansvalið í Fiskimannafelagnum at gera,serliga tá syndirnar bara blíva til einar tvær tríggjar.

Sum eitt undantak, haldi eg tað verða neyðugt at gera eina viðmerking til ta persónliga, ið Jan Højgaard førir fram í grein síni um mína fortíð, annars haldi eg tað vera meira áhugavert at skifta orð um, hvussu ein kann bøta um viðurskiftini hjá fiskimonnum.

Tað, at eg havi verið fiskiskipari, hvørki kann ella ætli eg at renna frá, eg kann vissa Jan Højgaard um, at ein kemur ikki sovandi upp á brúnna á einum skipi, sum er í tí frægara endanum í flotanum.

Fiskar ein onki, so verður onki at býta til nakran, hvørki til manning ella skip. Eg havi tey síðstu mongu árini verið avloysari við besta fiskiskipi í Svøriki, og havi verið sera glaður fyri hendan møguleikan, vónandi verður tað eisini møguligt hjá fleiri av okkara ungu monnum at sleppa at royna seg á sama hátt. Tað er vælsignað at sleppa at royna nýggj og góð skip. Hvussu kann tílíkt verða negativt í eygunum á formanninum í fiskimannafelagnum.

Tað, at eg havi átt part í skipi fyri skjótt 20 árum síðan, kann heldur ikki rennast frá, og tað er harmuligt, at Jan Højgaard ikki hevur roynt tað eisini. Samanlagt lærir man nógv av tí, man gjøgnum lívið fæst við, ikki minst tá illa hevur gingið í hond.

Tá tað í hasi løgnu greinini hjá formanninum verður funnist at, at eg í politikki havi samstarvað við fólk við aðrari politiskari uppfatan, bæði til høgru og vinstru, so er at siga til tað, at eg fann skjótt út av, at uttan samstarv og álit millum fleiri partar, kom onki burturúr. Mín fyrsta tala í tinginum um fiskivinnu, snúði seg um at fáa sett á stovn eina uppboðssølu av fiski í Føroyum. Tað bleiv harðliga funnist at, sum nakað sum ikki lat seg gera í Føroyum. Nøkur fá ár seinni bleiv eg nevndarformaður í Lønjavningargrunninum, John Petersen bleiv landstýrismaður í fiskivinnumálum, og tá var leyst og liðugt, og stutt eftir startaðu vit eina uppboðssølu gjøgnum eitt telefax á Lønjavningargrunninum.

Eg gleðist stórliga, tá hugt verður afturá, hvat góðar kreftur hava fingið uppboðssøluna til í dag.

Ikki minst týdningurin av at smærru keypararnir eru sloppnir fram at fiskinum, fyri at halda prísin uppi.

Við treiskni og samstarvi sá Samhaldsfasti dagsins ljós, somuleiðis ALS skipanin, inntøkutrygdin er meira enn tvífaldað.

Kanska var størsti sigurin, tá fiskimenn á Føroyagrunninum sluppu frá kvotaskipanini og yvir til fiskidagaskipanina. Neyvan nakrantíð fyrr hava so nógvar góðar kreftur staðið saman um at loysa eitt mál, sum fekk so stórar positivar fylgjur fyri allar partar í fiskivinnuni.

Tá Jan Højgaard setur spurnartekin við, um eg fari at halla reiðarans veg, so skal eg vísa á, at fyri fyrstu ferð í søguni hevur fomaðurin í Fiskimannafelagnum akkurát skrivað undir ein nýggjan sáttmála við Reiðarafelagið, har ikki eitt komma varð broytt, og ikki ein króna komin átrat til fiskimannin.

So kann hvør í sínum lag meta um, hvønn reiðarin er glaðari fyri.